# Kanningarnar av koralløkjunum halda fram

Fleiri koralløki undir Føroyum eru oyðiløgd av botntroli, men nú verður kannað, hvussu mong økir eru eftir, og hvar tey eru.

Fyri seks árum síðani fekk Fiskirannsóknarstovan upplýsingar frá skiparum um, hvar korallir eru undir Føroyum, og hvar korallir hava verið, men eru birturi orsakað av fiskiskapi. Hesi kortini vístu, at stór øki við korallum eru burturi, men at nøkur eru eftir.

Í 2003 gjørdi Fiskirannsóknarstovan undirsjóvarupptøkur av botninum í útnyrðing úr Mykinesi, og í fjør varð botnurin á Suðuroyarbankanum kannaður. Á teirri fyrru leiðini var lítið av korallum at síggja, men á Suðuroyarbankanum var heldur frægari.

Kanningarnar av koralløkjunum við Føroyar hava hildið fram í ár, og tær halda fram tey bæði næstu árini fyri at fáa eina mynd av, hvussu støðan er, skrivar Fiskirannsóknarstovan á heimasíðuni.

Nøkur øki við korallum eru stongd fyri troling, eftir at skiparar hava víst á, at har eru ørørdar korallir.

# Hava fingið rætta mannin

**Útbúgving, royndir og ein hugburður, sum sampakkar við fyritøkuna, vóru fremstu orsøkirnar, tá Kristian Davidsen varð settur í stjórastarvið hjá Føroya Tele**

STARVSSETAN
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Nevndarformaðurin í Føroya Tele er sannførdur um, at fyritøkan hevur fingið rætta mannin, nú Kristian Davidsen er settur í stjórasessin.

- Síðani Andras boðaði frá, at hann vildi gevast í sessinum, hevur nevndin sjálvandi viðgjørt málið væl og virðiliga, sigur Hákun Steingrímsson, nevndarformaður.

- Vit gjørdu tó tíðliga av, at vit ikki vildu søkja eftir stjóra, tí tá stendur tú í eini støðu, har tú bara mást krossa fingrar fyri, at rætti maðurin søkir starvið. Heldur valdu vit at leita eftir stjóra sjálvir, og her var Kristian rættiliga skjótt við í myndini.

Og hvat gjørdi so í seinasta enda, at tit valdu hann fram um onnur evni?

- Tað er ein blanding av fleiri viðurskiftum. Kristian hevur bæði útbúgving og royndir innan fjarskifti og leiðslu, og tí er eyðsæð, at hann hevur fakligu førleikarnar til sessin. Hartil er tað okkara fatan, at tann mynd, sum hann kundi hugsað sær av Føroya Tele sampakkar við tær ætlanir, sum nevndin hevur fyri fyritøkuni.

- Tí haldi eg okkum kunna siga, at vit eru púrasta sannførdir um, at hetta er rætti maðurin til starvið.

## Einki samband við starvssetanina

Tað er annars heilt stutt síðani, at sami Kristian Davidsen varð settur í starv sum Network Director hjá FT-International, men Hákun Steingrímsson avsannar, at tann starvssetanin hevði nakað at gera við ein ætlaðan stjórasess.

- Tað var stjórin í FT-International (Tróndur Djurhuus, blðm), sum setti Kristian í tað starvið, og tað var ein avgerð, sum nevndin ikki hevði nakað sum helst við at gera. Tá tað ræður um starvssetanir, so er okkara setningur at seta stjóra, og tað er so tað, sum vit hava gjørt í hesum sambandi, sigur Hákun Steingrímsson.




*- Kristian Davidsen, nýggi stjórin á Føroya Telé: -Yvirordnað er ætlanin at víðarimenna okkara virksemi á føroyska marknaðinum. Afturat tí skulu vit hava eitt økt fokus á at gera Føroya Tele til eina altjóða fyritøku*

oya Tele og skapa hendan veruleika saman, sigur Kristian.

## Leiðsluroyndir

Kristian veit ikki sjálvur, hví júst hann varð valdur. Hann metir, at tað er upp til onnur at siga, hvørjar førleikar hann hevur, sum gera hann egnaðan til starvið. Hann hevur tó eitt boð, tá ið vit spyrja hann um hetta.

- Kanska tað hevur nakað við mínar leiðsluroyndir at gera og mín førleika innan vinnugreinina. Eg havi eisini nógvar royndir við altjóða arbeiði frá tíðini, tá ið eg arbeiddi hjá Ericsson, sigur hann.

Eyðkennini hjá Kristiani kunnu væntast at vera ein altjóða satsning næstu árini. Hesum er Kristian ikki ósamdur í.

- Tað verður kanska serliga tað, sum eg fari at leggja dent á. Tað hevur nógv at týða fyri meg, at fyritøkan verður altjóðagjørd. Tað meti eg eisini verður eitt gott og rætt val, sigur Kristian at enda.

# Væl løntur sessur

Stjórastarvið á Føroya Tele er uttan iva eitt av teimum størvunum, sum standa heilt ovarliga á prestisjulistanum yvir privatar starvssetanir í Føroyum. Og tað er eisini eitt av teimum, sum stendur heilt ovarliga á topplistanum yvir lønir.

Sambært roknskapinum hjá Føroya Tele fyri 2005 var lønin til stjóran 1.168 tkr. hetta árið – ella knappar 100 tkr. um mánaðin. Tá er løn, frítið, eftirløn og møguligir aðrir ágóðar roknaðir við.

**-mørk**